Vikuskiftis Sosialurin




Færøernes Mellem- og Realskole:

# Millumskúlaflokkur í 1961-62

Í sambandi við eina framsýning, sum Jórunn Dánialsdóttir skipar fyri á ólavsøku í ár í gamla realskúlanum í Havn, leitar hon eftir myndum av lærarum og næmingum í "Færøernes Mellem- og Realskole" í tíðarskeiðnum 1916 til 1966.

Jórunn heitir á tey, sum eiga myndir frá hesum tíðarskeiði, um at ringja til sín á tel. 316024 ella 226024. Adressan er Sílagøta 3, FO-100 Tórshavn. Myndirnar kunnu eisini latast inn "navnmerktar" í Wrangler Shop í N. Finsensgøtu 23 (tel. 314710).

Tíðarfreistin er sett til 10. juni, og vónar Jórunn at fáa allar myndirnar til høldar til tað tíð.

Í dag hava vit mynd av einum millumskúlaflokki skúlaárið 1961-62.

Fremsta rað f.v.: Dánjal Hofgaard, Claus Bonnevie, Birgir Árting, Hartmann Joensen og Jógvan Arge.

Miðraðið f.v.: Jóannes í Dali, Jóna Guttesen (g. Rasmussen), Karin Djurhuus, Svanhild Christiansen (g. Joensen), Bergljót Ihlen, Eyðbjørg Andrésen (gift í Onglandi), Jógvan við Ánna, lærari, og Tordis Helmsdal (búsitandi í Danmark)

Aftasta rað f.v.: Durita Davidsen (g. Davidsen), Jóna Christiansen (g. Frederiksen), Katrin Hansen (g. Johansen) og Lív Dam

Um onkur hevur okkurt at viðmerkja í sambandi við hesa myndina, er viðkomandi vælkomin at seta seg í samband við Jórunn Dánialsdóttir.

*Myndaeigari: Svanhild Joensen*

Tekniski Skúlin í Tórshavn:

# Fýra bygningssnikkarar fingið prógv



Mikudagin 23. mai fingu fýra bygningssnikkarar prógvini handað á Tekniska Skúlanum í Tórshavn.

Bygningssnikkararnir eru f.v.: Jónleivur V. Jónsson, Justinus R. Hansen, Peter Dorian Petersen og Rúni Brandur Dam.

# Playstationkapping í Expert

Í sambandi við at Rói Næs, sum er í læru hjá Expert í SMS, skal gera sína endaligu høvuðsuppgávu, verður skipað fyri einum stórari Playstationkapping í Expert fríggjadagin 1. juni frá kl. 16.

Tiltakið er í sambandi við mentunarnáttina, sum verður fríggjakvøldið. Finalan verður leygardagin 2. juni kl. 14, har vinningarnir vera lætnir. 1. vinningur verður 1.500 krónur, 2. vinningur 1.000 krónur og 3. vinningur 500 krónur. Kappingin verður í Playstation 3 spælinum "Motor Storm".

Í høvuðsuppgávuni hevur Rói valt at leggja dent á tað nýggju Playstation 3 maskinuna.

Hann heldur at tað er spell, at fólk ikki hugsað um Playstation 3 sum annað enn eina maskinu til spøl, tí hon kann so mangt annað, hon kann eisini nýtast til at hyggja eftur DVD og teimum nýggu Blu-Ray filmunum. Og um tú vil lurta eftir tónleiki, ja so klárar hon eisini tað og til at hyggja eftir myndum. Sjálvt á alnótina klárar hon at fara. Tað er heldur eingin trupulleiki, sigur Rói Næs.

Rói, sum er 31 ára gamal og havnarmaður, hevur staðið í læru í Expert (fyrr 3-arin) síðan 1. juni 2005, og hann verður liðugur í oktober. Lærugreinin eitur "krambarkallur við radio og sjónvarpi sum sergrein".



*Í sambandi við at Rói Næs ger sína endaligu høvuðsuppgávu, verður skipað fyri einum stórari Playstationkapping í Expert fríggjadagin 1. juni*